# Ivasamt um force majeure kann brúkast um Summarfestivalin

**Á atgongumerkinum til Summarfestivalin, har neyðugt var at avlýsa konsertir leygarkvøldið, stóð, at fyrivarni varð tikið fyri force majeure. Løgfrøðingar siga, at hetta er eitt torført hugtak, sum støða skal takast til í hvørjum einstøkum føri. Tó kann illveður ikki sigast at vera óvanligt í Føroyum, sigur advokatur. Brúkarasamtakið ætlar ikki at krevja endurgjald fyri seld atgongumerki**

FORCE MAJEURE
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Um vikuskiftið varð Summarfestivalurin noyddur at avlýsa fleiri konsertir*

Eftir at fyrireikararnar av Summarfestivalinum um vikuskiftið vórðu noyddir at avlýsa ein stóran part av tiltakinum leygardagin, og eitt orkstur ikki spældi í fjør, hevur spurningurin, um festivalgestirnir hava rætt til at fáa part av atgongumerkinum endurgoldið, tikið seg upp.

Á sjálvum atgongumerkinum til Summarfestivalin stóð tilskilað, at »Fyrivarni verður tikið fyri force majeure«.

Tað er kortini ivasamt, um hugtakið force majeure umfatar hvirlur, vind og regn.

Sosialurin hevur prátað við ein føroyskan og ein danskan advokat, sum báðir siga, at force majeure merkir viðurskifti, sum eru púra óvæntað og koma uttanífrá.

- Hóast tað er nevnt á atgongumerkinum, so bíta dómstólarnir tó neyvan á hetta.

- Í Føroyum skal nógv til force majeure. Illveður hevði neyvan verið góðkent sum force majeure. Høvuðreglan er, at fólk eiga at fáa pengarnar aftur, um tað so er eitt atgongumerki ella ein pakki av margarini, sigur ein føroyskur advokatur, sum ikki vil vera nevndur.

## Meting má gerast í hvørjum máli

Ein annar advokatur, sum starvast í Danmark, minnir á, at force majeure er eitt torført og vítt hugtak, og tí má metast í hvørjum einstøkum føri, um hugtakið kann brúkast. Hinvegin er nógvur vindur neyvan nakað, sum er púra óvæntað í Føroyum, heldur advokaturin, sum ikki vil taka støðu til hetta konkreta málið.

Hann sigur eisini, at tað helst eisini er munur á, um fólk hava verið til nakrar konsertir, ella um tey t.d. hava keypt dagsatgongumerki og onga konsert hava hoyrt.

Force majeure er serliga brúkt innan arbeiðsrætt, har tað rættiliga greitt verður tulkað. Hinvegin metir danski advokurin, at t.d. á Roskildefestivalinum, har árførið var, høvdu fólk neyvan fingið goldna pengini afturrindaðan, av tí at festivalurin helt fram, og fólk kundu vera festivalinum, um tjaldútgerðin o.a. væl at merkja var nóg góð.

Ein fyritøka, ið ofta nýtir hugtakið force majeure er DSB í Danmark. Tó hava løgfrøðingar javnan víst á, at vánaligt veður kann koma fyri, og tí ikki kann roknast sum nakað óvantað uttanífrá.

## Brúkarasamtakið skilir Summarfestivalin

Petur í Gong, formaður í Brúkarasamtakinum, sigur tó, at tey ikki ætlað sær inn í hetta málið.

Hann sigur, at hóast hann ikki er løgfrøðingur, so metir hann ikki, at talan eigur at vera um endurgjald frá festivalinum.

- Eg var sjálvur har norðuri og vísi stórt forstáilsi. Eg haldi tó, at tað átti at verið avlýst áðrenn, sigur Petur í Gong.

- Fyri okkum er tað grundleggjandi, at um tú rindar fyri okkurt, so skalt tú hava tað, men í hesum førinum vóru umstøðurnar vánaligar, sigur formaðurin í Brúkarasamtakinum, sum einki ætlar at gera við Summarfestivalin.

### FAKTA

Force majeure er det fuldstændige uforudsigelige - det vil sige lidt populært sagt - et vulkanudbrud på Rådhuspladsen. Snevejr - lukkede broer - udkørselsadvarsler i vintermånederne i Danmark er bestemt ikke uforudsigeligt. Så derfor vil man i tilfælde af afbestilling skulle anses dette som sådan, og betale godtgørelse efter de indgåede aftaler.

kelda: www.danskeerhverv.com

# Summarfestivalurin skumpar ovastevnuna

**Komandi álmanakkaár ger, at ein møguligur Summarfestivalur helst fer at skumpa ovastevnuna eina viku longur inn í august mánað**

SUMMARFESTIVALUR
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Tað rann kalt eftir rygginum á nólsoyingum sunnudagin, tá Steintór Rasmussen, fyriskipari, meldaði út, at teir at ætla at flyta Summarfestivalin næsta ár eina viku longur inn í august mánað. Hetta merkir nevniliga, at festivalurin í Klaksvík rennur saman við ovastevnu, sum altíð er annað vikuskiftið eftir ólavsøku.

- Eg gjørdist ikki sørt kløkkur, tá eg hoyrdi útmeldingina sunnudagin, tí vit vistu av ongum, sigur Jákup av Skarði, formaður í stuðulsnevndini fyri svimjihyl í Nólsoy.

Hann vísir á, at tað ikki ber til at flyta ovastevnuna eina viku fram, tí tá er hon ov nær ólavsøkuni. At flyta ovastevnuna eina viku longur inn í august hevur eisini verið ein trupulleiki undanfarin ár, av tí at so kom stevnan í krambulasju við byrjanina av skúlaárinum.

Men sum komandi álmanakkaár sær út, verður helst møguleiki fyri at útseta ovastevnuna eina viku, uttan at hon rennir saman við skúlaárið. Triðja vikuskiftið eftir ólavsøku 2008 liggur nevniliga 15. og 16. august.

- Nú havi eg ikki tosað við Mentamálaráðið, men er tað soleiðis, at skúlin ikki er byrjaður tá, so kann væl vera, at vit flyta ovastevnuna til triðja vikuskiftið eftir ólavsøku, sigur Jákup av Skarði.

Hann heldur tað í øllum førum vera óheppið, um stevnan og festivalurin verða hildin sama vikuskiftið men leggur afturat, at um so er, at skúlin byrjar áðrenn 16., er tað ikki ómøguligt, at bæði tiltøkini renna saman.

Steintór Rasmussen leggur dent á, at enn er eingin avgerð tikin, um nakar Summarfestivalur yvirhøvur verður, men at ætlanirnar um at flyta festivalin eru nakað, fyriskipararnir hava hugsað um leingi.

- Vit hava leingi prátað um at flyta festivalin eina viku. Vit meta tað vera óheppið at hava ein festival bert nakrar fáar dagar eftir ólavsøku, sigur Steintór Rasmussen, sum sigur seg hava stóra virðing fyri ovastevnu, og hann ivast ikki í, at pláss verður fyri báðum tiltøkum uttan at tað rennir saman við antin ólavsøku ella skúlabyrjanina.